húsarhaldsskúla, og síðani fór hon at arbeiða á sjómansheiminum Bethel, sum liggur í Nyhavn í Keypmannahavn. Tað eydnaðist henni at koma heim beint áðrenn kríggið brast á.

Í 1940 giftust Simona og Sámal, og tey fingu tískil bert fýra ár saman. Eitt sum Maria hevur fingið at vita um pápa sín er, at hann hevði keypt henni einar skógvar í Íslandi at hava heim við.

Sámal var sonur Elspu og Petur Kristian Petersen. Hann var ættaður úr Ólastovu í Syðrugøtu. Sámal og Simona búðu í Rituvík, og skuldu fara at byggja. Viðurin var komin til húsini, men so hendi vanlukkan hjá hesi lítlu familju.

Tá ið Sámal fórst, flytir Simona heim aftur til foreldrini, sum vóru Anna Martina og Andreas á Rætt uttarlaga í Syðrugøtu. Her búði Simona allar sínar dagar, og hon var væl fyri nærum til tað seinasta.

Simona var óføra røsk at arbeiða, og hon arbeiddi leingi við at binda hjá Suffíu Gregersen, sum var upprunin til tað virksemi, sum seinni gjørdist Tøtingarvirkið í Gøtu.

Petra hja Soffíu tekur til, hvussu lagalið Simona var tá ið okkurt óvanta stakk seg upp. Tá var Simona altíð tøk.

Foreldrini vóru stórur stuðul hjá henni, og tey høvdu góða umsorgan fyri døtrunum hjá Simonu. Minnist annars tey sum elskulig menniskju.

Naena, sum er ættað úr Syðrugøtu, minnist Simonu sum eitt ediligt menniskja. Hon hevur eitt minni um hana, sum sigur meira enn nógv orð. Mamma Naenu, Perlina, var eina tíð nakað sjúklig, men Simona var altíð fús at hjálpa teimum við konufólkaarbeiði í húsinum og kom hetta sera væl við. Sum ung, áðrenn hon fór niður, arbeiddi Simona á sjómansheiminum í Havn. Tey jólini, sum Simona var á sjómansheiminum, var mamma Naenu innløgd á sjúkrahúsinum. Fremsta minnið hjá Naenu frá hesum jólum var, at Simona hevði keypt teimum hjá Perlinu eina konfekteskju. Eitt var, at slík konfekt var sera forkunnugt tá, men hetta var keypt av eini løn, sum neyvan hevur verið tann heilt stóra. Hetta hevur Naena ikki gloymt Simonu, hóast 70 ár eru liðin!

So fara vit at skoyta uppí, at sambært Mariu, dóttir Simonu, var mamma hennara sera hugtikin av Miðvikuni, og lasa hana við áhuga hvørja ferð.

Mamma Naenu var úr Rituvík, og hon minnist, hvussu tað varð at bíðað eftir tíðindum um Verdandi. Men tey komu



Sámal og Simona giftast í 1940. Tey vóru ung og alt bendi á eina ljósa framtíð



Her er Maria, dóttir Sámal, niðri á kajuni í Rituvík og sigur pápa sínum farvæl hansara seinasta túr, tá ið hann ikki kemur aftur. Konan er Edith, gift við Frederik Olsen



Í 1944 druknar Sámal frá konu og tveimum døtrum, 3 og 1 ára gamlar. Henda myndin er tikin júst um hesa tíðina

ongantíð.

Mostir Naenu, Anna, búði eisini í Gøtu. Hon var í hesi tíðini farin til Rituvíkar til eina jarðarferð. Hon greiddi frá, at Símun á Høgabóli, reiðarin á Verdandi var eisini við til jarðarferðina, men hann kom ongantíð úr bilinum. Tað hevur staðið nógv á honum sum vituligt er.

Um onkur hevur nakað at leggja afturat søguni um Verdandi vilja vit fegin frætta.

Her kann kortini leggjast afturat, at sambært Niels J Arge, mettu íslendskir myndugleikar, at skipið var farið av krígsávum, men hetta er sera óvíst.

### Teir sum fórust við Verdandi vóru:

**Óli Larsen**, Oyrabakka, skipari, 55 ár

**Jens Knudsen**, Saltangará, bestimaður, 39 ár

**Frants Davidsen**, Strendur, motorpassari, 32 ár

**Niels Jacobsen**, Streymnes, kokkur, 48 ár

**Samuel Petersen**, Rituvík, 29 ár

**Olaf M Larsen**, Oyrarbakki, 22 ár

**Christian Marius Sofus Frederik** Højgaard, Rituvík, 50 ár

**Petur A. Larsen**, Oyrarbakki, 25 ár

**Bill Justinussen**, Glyvrar, 21 ár

**Ernst Petersen**, Rituvík, 22 ár

**Daniel Jacob Henning** Højgaard, Toftir, 25 ár

**Olaf J Larsen**, Fuglafirði, 43 ár

**Han Pauli Frederik** Højgaard, Rituvík, 22 ár

**Thomas Jacob** Høj, Strendur, 43 ár

**Oliver Mikkelsen**, Syðrugøtu, 38 ár

Allir menn í besta aldri.

## Tórhallur: Funnu snurrivoddið aftur

Eg var tvey ár á Siglufirði. Ein skipari, sum lá sjúkur á sjúkrahúsinum, har eg var pedellur, hevði ein bát, sum var 24 tons. Hann royndi við snurriváð, og eg fór við honum. Vit fóru vestur í Skagafjørðin, og vit kastaðu. Men tá høvdu teir gloymt at sjekla greiðirnar saman, so vit mistu alt. Tá ið endin fór var skiparin ikki blíður. Vit máttu fara at fáa fatur aftur á reiðskapinum. Tað gekk ikki væl í hond. So sigi eg við skiparin: "Vit eru ikki har voddið liggur." Eg bað hann sigla nakað. Tá ið vit steðgaðu, kastaðu vit dreggið út, og vit fingu fast beinanvegin. Hetta helt hann vera fantastiskt. Eg haldi, at hann kom at halda so nógv av mær. Tá ið hann fór at fáa sær at eta ella at sova, skuldi eg vera í stýrihúsinum. Vit fingu nógvan fisk, og eg var nakrar mánaðir við honum. Tá bleiv hann sjúkur.

### Á sild

Tá fór eg við einum báti frá Vestmannaoyggjunum. Vit fóru á sild við snurpunót. Teir vóru tríggir beiggjar, sum áttu hann. Báturin var um 80 tons til støddar. Teir vóru av raskastu monnum og fittir at vera saman við. Vit fingu nógva sild.

Vit fiskaðu út frá Siglufjørðinum, har tað var sera stórt virksemi við sildaveiðu og virking av sild. Í sildatíðini, sum var frá juli og út í september, kom ein hópur av skipum til Siglufjarðar at veiða sild. Higar komu eisini útlendsk skip sum svensk og norsk.

Her kann greiðast frá eini stuttligari søgu, sum ein íslendskur fiskimálaráðharri fortaldi á einum norønum fiskivinnufundi fyri nøkrum árum síðani.

Skipini lógu ofta inni, tá tað ikki var veður at fiska. Tá var eisini farið í dans, tað vóru nógvir mans. Tað hevur eisini verið drukkið. Hetta førdi ofta til slagsmál millum tær ymisku tjóðirnar. Men so kom politiið ofta uppí leikin, og tá fóru allir í part at berjast móti politinum! Hetta var brúkt sum dømi um týdningin av samanhaldi.

Sildin hevur eina áhugaverda søgu í Íslandi. Norðmenn byrjaðu longu í 1800 talinum at hava áhuga fyri íslendsku sildini. Men søgan um íslendska sildaævintýrið byrjaði í 1903, tá tað eisini var byrjað við snerpinótaveiðu. Virksemið varð í nógvum býum á Norðurlandinum og Eysturlandinum. Men serliga á Siglufjørðinum kom sildin at hava stóran týdning. Virðið av samlaða sildaútflutninginum gjørdist upp til 35% av samlaða íslendska fiskaútflutninginum. Bert Siglufjørður kundi umboða upp til 20% av útflutninginum.

Fyrsta sildaverksmiðjan kom á Siglufirði í 1911. Higar komu 10.000 fólk alla møguliga staðni frá at fáa sær arbeiði. Tá ið illveður var lógu hundraðvís av skipum á fjørðinum.

Sild hevði stóran týdning sum føði hjá europearum gjøgnum tey bæði heimskrígini. Sildatíðin endaði seinast í 60-unum.

Í dag er eitt minnissavn á Siglufirði, har tað ber til at kunna seg um hesa tíðina. Tað ber til at fáa meira at vita við at fara inn á Google: "Siglufirði". Fyrsta tilvísingin er til hetta savn. Eisini skipa teir fyri árligum